## Aftur á vøllinum

Tað var kanska ikki tað heilt nógva, sum áskoðararnir hjá Manchester United høvdu at fegnast um í málleysa javnleikinum móti Villarreal í gjárkvøldið. Men løtan var kensluborin, tá Cristiano Ronaldo varð skiftur inn fyri Ji-Sung Park. Ronaldo, sum er stórfavorittur at verða kosin heimsins besti spælari, var í alt summar partur av yvirskriftum, tí hann segðist vera ávegis til Real Madrid. Tann handilin varð tó av ongum, og sjálvur hevur spælarin verið uttanfyri eftir skurðviðgerð í øklinum. Men í gjárkvøldið fekk hann so fyrstu minuttirnar hetta kappingarárið.



## Telva í Vestmanna

Um vikuskiftið verður fyrsta umfarið av Grandp-Prix kappingini í talvi. Telvað verður í Vestmanna skúla, og verða fyrstu borðini telvað longu í kvøld, hóskvøldið. Hildið verður so fram fríggja-, leygar- og sunnudagin. Umhugsunartíðin hjá einstøku telvarunum er 90 minuttir + 30 sekund fyri hvønn leikin. Kontantar virðislønir verða lætnar trimum teimum fremstu telvarunum.

# Flogbóltslandslið til Svøríkis

**Í gjár og í dag fóru føroysku U17-landsliðið hjá gentum og dreingjum til Svøríki, har tey skulu taka lut í kappingini um at gerast norðurlendskur meistari. Kappingin verður í ár hildin í Falkøbing í Svøríki. Kappingin byrjar fríggjadagin, og umframt Føroyar taka Danmark, Noreg, Finnland og Ísland eisini lut í kappingini**



*U17 dreingir*
*Gunnar í Dali, TB*
*Brandur Heinason, SÍ*
*Sonni Zachariassen, SÍ*
*Bogi Midjord, Fleyr*
*Bjarki Enni, Fleyr*
*Gudfinnur Thorsteinsson, Fleyr*
*Rói Hentze, Fleyr*
*Jan Ó. Ellingsgaard, ÍF*
*Uni R. Petersen, ÍF*
*Bjarni Larsen, ÍF*

*Venjarar: Jan Hentze og Rúna Hentze.*



*U17 gentur*
*Eyð G. Magnussen, Fleyr*
*Manja V. Holm, TB*
*Anja Danielsen, Fleyr*
*Sonja Thomassen, KÍF*
*Heidi Christiansen, SÍ*
*Brynhild Dam, Fleyr*
*Eina Kalsø, Mjølnir*
*Sofía Purkhús, Mjølnir*
*Anna Sára Johansen, Fleyr*
*Jastrid Sivertsen, Mjølnir*

*Venjarar: Hans Mikkelsen og Rosa Jacobsen.*




**Formula-liðið**
*Sosialurin mannar Formula-liðið við teimum spælarum, sum stóðu seg best í 22. umfarinum av Formula-deildini*